

# Fulltrúi og skrivari
## til umsiting av Kommunulæknaskipanini

**Tvey størv til umsiting av Kommunulæknaskipanini eru leys at søkja til setan 1. september 2008, ella eftir nærri avtalu.**

### Fulltrúi til umsiting av Kommunulæknaskipanini

Talan er um eitt nýtt starv í Kommunulæknaskipanini, har uppgávurnar verða at taka sær av umsiting av Kommunulæknaskipanini, m.a. at tryggja, at leysu størvini í skipanini verða mannað umframt at finna avloysarar til føstu kommunulæknarnar. Uppgávan er eisini at ansa eftir og hava umsjón við útreiðslunum til Kommunulæknaskipanina. Harumframt kemur tú saman við Almanna- og heilsumálaráðnum at vera knýttur at arbeiðinum við at nútímansgera Kommunulæknaskipanina.

Fyri framman standa nógvar stórar avbjóðingar viðvíkjandi Kommunulæknaskipanini og skal tí tann, ið settur verður, tola broytingar í starvinum. Ætlanin er, at umsitingin av skipanini skal flytast úr Almanna- og heilsumálaráðnum. Somuleiðis skal gongd setast á at nútímansgera Kommunulæknaskipanina, og er hetta ein stór og spennandi avbjóðing.
Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

#### Førleikakrøv
Viðkomandi búskaparfrøðiliga ella samfelagsfrøðiliga útbúgving frá hægri lærustovni, ella drúgvar royndir frá almennari umsiting. Góðan teldukunnleika og dugir væl at samskifta við nógv ymisk fólk. Starvsroyndir frá miðfyrisitingini er ein fyrimunur. Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevni og evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

#### Lønar- og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og Búskapar- og løgfrøðingafelagið samsvarandi útbúgving ella við avvarðandi yrkisfelag. Tann, sum settur verður, má kunna tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum og starvstaðnum.

### Skrivari til umsiting av Kommunulæknaskipanini

Talan er um eitt nýtt hálvtíðarstarv í Kommunulæknaskipanini, har uppgávurnar m.a. verða at vera við til at fyrireika mál og lættari málsviðgerð, at vera skrivari á ymsum fundum og aðrar fyrifallandi skrivarauppgávur. Saman við fulltrúanum at samskipa býtið av málum og skráseta samsvarandi hesum.

Starvið er áhugavert og mennandi við skiftandi og fjølbroyttum uppgávum. Starvið er sjálvstøðugt, og góðir møguleikar eru fyri skeiðum og framhaldandi førleikamenning.

#### Førleikakrøv
Viðkomandi fyrisitingarliga útbúgving. Starvsroyndir frá miðfyrisitingini eru ein fyrimunur. Harumframt vænta vit, at tú hevur góð samstarvsevnir og góð evni at orða teg greitt í skrift og talu, og dugir at arbeiða sjálvstøðugt.

#### Lønar- og setanartreytir
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Fíggjarmálaráðið samsvarandi útbúgving. Tann, sum settur verður, má kunna tola møguligar broytingar í starvsinnihaldinum og starvstaðnum.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu sendast til
Almanna- og heilsumálaráðið,
Eirargarður 2,
FO 100 Tórshavn.

Umsóknir skulu vera Almanna- og heilsumálaráðnum í hendi í seinasta lagi hósdagin 18. juli 2008, kl. 12:00. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Poul Geert Hansen, aðalstjóra, ella Hansu Sørensen, deildarleiðara, telefon 30 40 50 ella teldupost: ahr@ahr.fo.

KREA

Almanna- og heilsumálaráðið, ið umsitur almannamál, heilsumál og bústaðarmál, veitir landsstýrinum ráð, tryggjar haldgott grundarlag og ger hugskot til veruleika. Í løtuni starvast 32 fólk í ráðnum.

ALMANNA- OG HEILSUMÁLARÁÐIÐ

*Vit draga eina línu - Vit seta skynsemi í hásæti - Vit vilja vita - Vit bróta slóð*

Eirargarður 2 . FO-100 Tórshavn
Tel 30 40 50 . Faks 35 40 45 . ahr@ahr.fo . www.ahr.fo